

*Sea Star var tað fyrsta seismiska skipið hjá Western, sum kom til Føroya. Síðani hevur Polar Princess verið her og nú kemur so Western Atlas. Mynd: jan*

*Seismisku kanningarnar byrja aftur í apríl:*

# Western kemur við flaggskipi sínum

*Seismikkskipiðm Western Atlas, sum arbeiðir í fjareystri, kemur til Føroya um hálvan apríl. Eftir at skjóta eru 5500 kilometrar.*

Tað verður hvørki Sea Star og Polar Princess, sum skulu gera seismisku kanningarnar fyri amerikanska felagið Western við Føroyar í summar. Talan verður heldur um sjálvt flaggskipið hjá felagnum. Skipið eitur "Western Atlas" og hevur havið navn eftir sjálvum felagnum.

Western Atlas er í løtuni í fjareystri, har tað ger seismiskar kanningar. Talan er um eitt skip, sum er sera væl útgjørt. Tað hevur tikist við at gera 3D seismiskar kanningar í nógvum londum. 3D stendur fyri trydimensionelt og er hetta tann kanningarháttúrin, sum verður brúktur beint áðrenn farið verður at bora eftir olju. Nú oljufeløgini tulka seismiska tilfarið frá Western skulu tey til at gera av, um upplýsingarnir eru so mikið áhugaverdir, at tey vilja hava meira nágreiniliga upplýsingar og tá er talan um 3D.

Nógva seismiska virksemið enskumegin markið í fjør var nettup 3D-kanningar.

Upprunaliga varð ætlanin annars at fara undir aftur seismisku kanningarnar í mai, men tað er nú framskundað nakað, og byrja kanningarnar um hálvan apríl.

Western, sum hevur fingið loyvi at gera allar tær seismisku kanningarnar á føroyskum havøki, hevur higartil gjørt góða helvt av arbeiðinum. Teir skutu í fjør 6500 kilometrar. Tilsamans skulu teir skjóta 12.000 kilometrar kring alt Føroyar.

Martin Heinesen, leiðari á Oljufyrisitingini sigur við Sosialin, at tær upptøkurnar, sum í løtuni eru viðgjørdar og nú verða tulkaðar eru frá økinum sunnan fyri og eystan fyri Føroyar. Hetta er í nánd av teimum økjum, har bretar hava funnið olju hinumegin markið.

Sosialurin hevur annars frætt, at tað hevur verið stórur gravgangur millum starvsfólk hjá Western at sleppa aftur til Føroya at arbeiða.

Orsøkin til hetta er, at her eru skipað viðurskifti og tænastan í landi hevur verið fyrsta flokk.

Tað er Smyril Line, sum er umboð hjá Western.

jan

# Føroyingur stjóri í týðandi oljufelag

Útvarp Føroya vísti í vikuni at siga frá, at føroyingurin Graham Stewart er útnevndur sølustjóri í bretska menningarfelagnum »Petroleum Science and Technology Institute«, sum hevur skrivstovu í Edinburgh og Aberdeen í Skotlandi.

Tað eru oljufeløg, sum eiga PSTI. Felagið arbeiðir við at menna nýggja tøkni til oljuvinnu. Tað hevur serligt samstarv við granskarar við granskarar á lærdum háskúlum og mennir teirra úrslit til tøkni, sum kann brúkast í verki.

Graham Stewart, sum nú er sølustjóri hjá felagnum, hevur frammanundan starvast í menningardeildini hjá PSTI og hjálpt granskarum at fáa úrslitini umsett til amboð og skipanir, sum kunnu brúkast í oljuvinnuni.

Graham Stewart fylgir eisini við í kanningunum í sambandi við eina møguliga komandi føroyska oljuvinnu. Hann var millum fyrilestrahaldararnar á oljuráðstevnuni í Havn fyri góðum ári síðani.

jan



*Graham Stewart var við á oljuráðstevnuni í Havn fyri góðum ári síðani*

**Eliaskirkjan,** Vesterbrotorv 49

**Møti er hvørt leygarkvøld kl. 19.00.**

**Bussarnir 6, 16, 28 og 41 steðga nærindis.**

**Nærri fæst at vita á tlf. 031-242268 ella 031-578999.**

## Leyst starv hjá EIMSKIP

Vit hjá P/F EIMSKIP í Føroyum leita eftir skrivstovufólki til vøruterminal okkara á Eystaru Bryggju. Starvið umfatar:

* **Útflyggjan av vøru**
* **Lagurstýring**
* **Samskifti við viðskiftafólk og tænastufyritøkur**
* **Vanligt skrivstovuarbeiði**

Vit leita eftir fólki, sum hevur:

* **Hollan kunnleika til PC teldur**
* **Hevur sinni til tænastuuppgávur**
* **At arbeiða skjótt og væl í livandi umhvørvi**

Umsóknir skulu vera innkomnar innan 11. mars.

**EIMSKIP**

P/F Eimskip í Føroyum, Postsmoga 100, FR 110 Tórshavn, tlf 19715, fax 19355